

*Við einum stroki vóru hársprei 80'ini skolaði út á Buchwald og Alternative Nation sá dagsins ljós. Alla skyldina hevði Kurt Cobain og hansara bólkur Nirvana*



*Like a Virgin var lagið, sum sendi Madonnu til skíggja, har hon skjótt 20 ár aftan framvegis sveimar*

# Her eru teir! 100 teir bestu poppsangirnir! Ella…?

**Amerikanska tónleikaritið Rolling Stone og MTV America hava talað. Við útgangsstøði í The Beatles og teirra lending í Amerika, halda tey seg vita, hvørjir hundrað teir bestu poppsangirnir eru frá 1964 og frameftir. Tað finst helst ongin lesari, sum tekur undir við hesi raðfesting. Listin berur eisini greiðar ábendingar um, hvussu ymiskt Evropa og Amerika raðfesta løg. Við føroyskum oyrum munnu fleiri av løgunum kennast sum tann reina tokutala. Lesið her kortini, hvussu 10 tey fremstu løgini sóu dagins ljós**

TÓNLEIKUR
*Niclas Johannesen*

### 1. YESTERDAY

Ár: 1965 Sangskrivarar: John Lennon, Paul McCartney

Um lagið, sum skuldi gerast tann mest endurspældi sangurin í heiminum hevur Paul McCartney sagt: “Eg hevði eitt klaver standandi við songina, og eg má hava droymt tað, tí eg bóltaði út úr songini, setti hendurnar á tangentarnar og eg hevði sangin í mínum høvdi. Har varð alt, fullfíggjað. Eg fekk meg ikki at trúgva tí. Tað kom ov lætt”

Lagið kom so lætt, at McCartney í longri tí spurdi ymisk fólk, um tey høvdu hoyrt hetta lagið áður. McCartney bjóðaði í fyrstu syftu eisini fleiri øðrum sangarum lagið, tí hann helt, tað riggaði ikki til The Beatles. George Martin, produsari, hevði sín stóra lut í, at lagið fekk eina strúkara-kvartett á. The Beatles royndu upprunaliga at spæla sangin í traditionellum høpi, har eitt nú John Lennon spældi orgul. Men tað riggaði ikki ordiliga. Paul McCartney hevur sagt um hugskotið at leggja strúkarar á, at honum dámdi tað onki. “Vit eru ein rockbólkur. Eg vil ikki hava syrupp á”, segði hann við George Martin. “Latið okkum royna tað, og um tær ikki dámar tað, so kunnu vit fara aftur til bara guitar og rødd,” segði George Martin og Paul McCartney boygdi seg, og nakrar mánaðir seinni kundi úrslitið hoyrast á



*– Alt sum Rolling Stones høvdu gjørt frammanundan var spennandi, men Satisfaction dróg samanum, segði Mick Jagger við Rolling Stone*

LP-plátuni Help!

Kom lagið lætt til McCartney, so gekst verri við tekstinum. Fyrsta linjan var “Scrambled eggs/Oh my babe, how I love your legs”. Men lukkutíð fyri lagið, kom McCartney við einum øðrum teksti, sum hann skrivaði, meðan hann helt frí við táverandi unnustuni Jane Asher. Samstundis, sum hetta gjørdist mest endurspælda lagið í heiminum, so var hetta eisini fyrsta veruliga soloútspælið frá einum av limunum úr The Beatles. Ongin av hinum spælir við á tí.

### 2. (I Can't Get No) SATISFACTION -

Ár: 1965 Sangskrivarar: Mick Jagger, Keith Richards

“Alt sum Rolling Stones høvdu gjørt frammanundan var spennandi, men Satisfaction dróg samanum” sigur Mick Jagger við Rolling Stone. “Tað defineraði alt upp á tríggjar og ein hálvan minutt.” Hetta var eisini fyrsta singlelagið hjá bretska rockbólkinum, sum gjørdist nummar eitt í Amerika.

Rolling Stones lána í lagnum dúgliga frá sínum hetjum - eitt nú Chuck Berry, sum áður hevði sungið “ I don't get no satisfaction from the judge” og blues tónleikaranum Muddy Waters, ið hevði gjørt lagið “I Can't Be Satisfied”, sum var eitt lag, ið Rolling Stones plagdu at spæla live.

Mick Jagger skrivaði tekstin liggjandi við ein svimjihyl á einum motelli í Florida á vári 1965.

Serliga eyðkenni við Satisfaction er tó fantastiska einfalda guitar-riffið, sum kom til Keith Richards í svøvni líka sum Yesterday kom til Paul McCartney. Richards vaknaði á miðari nátt, spældi riffið á akkustiskan guitar, tók tað upp á band, fór so til songar aftur og svav so søtan. Rolling Stone spældu lagið inn meðan teir vóru á turne í USA - eitt land, har teir ikki fingu ordiliga hol á fyrr enn við júst lagnum Satisfaction. Tað tók bert lítla løtu at spæla lagið inn og Keith Richard var sannførdur um, at talan var bert um eina demo. Richards var alt annað enn vísur í, at Satisfaction fór at vera eitt single-lag. “Vit fóru úr studionum rímiliga væl nøgdir og hugsaðu, at hetta var gott, men tað má arbeiðast meira upp á tað. Tíggju dagar seinni sjarraði lagið á útvarpinum.”

Keith Richard viðgongur eisini, at hann var ikki rættiliga nøgdur við Satisfaction fyrr enn hann hoyrdi útgávuna við Otis Redding, har blásarar eisini spæla riffið. Mick Jagger sigur við Rolling Stone, at tað altíð gleðir hann at hoyra onnur royna at innspæla teirra lag (Britney Spears royndi seg á seinastu útgávuni við hesum lagnum).

### 3. SMELLS LIKE TEEN SPIRIT

Ár: 1991 sangskrivarar: Kurt Cobain, Nirvana

Tað var tann 10. September 1991 at alt broyttist: Við einum stroki vóru hársprei 80'ini skolaði út á Buchwald og Alternative Nation sá dagsins ljós. Alla skyldina hevði Kurt Cobain og hansara bólkur Nirvana. Sangurin gjørdist ikki bara teirra flagskip, men sjálvt symbolið upp á eitt tíðarskeið, har ein desillusjoneraður ungdómurin kravdi



økologiskan substans fram um parfumerað undirhald. Rolling Stone metir, at “Smells Like Teen Spirit” hevði sama kollveltandi týdning fyri amerikanska ungdómin, sum The Beatles lagið “I Want To Hold Your Hand” og “Like A Rolling Stone” við Bob Dylan høvdu í 60'unum.

“Teen Spirit” er eitt skúladømið um stóra, einfalda list, ið milliónir av menniskjum taka til sín. Lagið er bygt á fýra akkordir. Guitarsoloin bara endurtekur messandi melodiin. Sjálvur gandurin liggur tó í mátanum, sum Kurt Cobain syngur lagið. Lagið er bygt á gomlu fintuna, at fara frá bleytum yvir í hart - frá hálvdoyvdari líkasælu í versunum til skerandi desperatión í niðurlagnum. Sjálvur hevur Kurt Cobain víst til The Pixies, ið var hansara yndisbólkur.

Aftan fyri alternativa úttrykkið liggur tó eisini eitt framúr tev fyri pop melodiskum handverki. Kurt Cobain hevði John Lennon sum sína stóru fyrimynd. “Kurt elskaði The Beatles”, sigur Nirvana bassleikarin Krist Novoselic. Produsarin á Nevermind Butch Vig vísir eisini á, at Cobain skrivaði allatíðina løg. Í steðgum sat plágaði frontmaðurin altíð og klimpraði upp á guitarin. “Eg hoyrdi hesar fantastisku popp-melodi strofurnar koma frá honum. Men so skjótt sum eg royndi at fáa tað á band, so helt Kurt uppat við at spæla. Hann var fyltur við punk-øði og fremmandagerð, men hann hevði eisini eitt følið popp talent, sum hann ikki altíð vildi kennast við” sigur Butch Vig við Rolling Stone.

Á Smells Like Teen Spirit var tað tó sárbæra røddin hjá Cobain, ið var krúnan á kransakøkuni saman við klassiska setninginum “It's hard to find/Well, nevermind”.

### 4. LIKE A VIRGIN

Ár: 1984 sangskrivarar: Billy Steinberg, Tom Kelly

Like a Virgin var lagið, sum sendi Madonnu til skíggja, har hon skjótt 20 ár aftan framvegis sveimar. Madonna kom til legendariska disco-produsaran Nile Rodgers og segði: “Vit kunnu ikki arbeiða saman, um tær ikki dámar hetta.” Produsarin svaraði: “Tað góða við tí er, at mær dámar tað ikki nú, men tá eg eri liðugur at arbeiða við tí, fari eg at elska tað.”

Lagið, sum í skeivum hondum skjótt kundi verði ein pínlig parodi upp á smagloysi, fekk rættiligt lív við kønu hond Rodgers. Eitt nú valdi hann at brúka veruliga tónleikarar heldur enn maskinur, ið eyðkennu fyrstu plátuna hjá Madonnu.

Hóast Madonna ikki sjálv hevur skrivað lagið, so gjørdist hetta sangurin, sum fram um allar aðrar legði lunnar undir tað, ið seinni fekk heitið ‘girl power’, og í tí ríkinum valdar ongin ivi um, hvør drotningin framvegis er…



*The Beatles royndu upprunaliga at spæla sangin í traditionellum høpi, har eitt nú John Lennon spældi orgul. Men tað riggaði ikki ordiliga. Paul McCartney hevur sagt um hugskotið at leggja strúkarar á, at honum dámdi tað einki. »Vit eru ein rockbólkur. Eg vil ikki hava syrupp á«, segði hann við George Martin*

### 5. BILLIE JEAN

Ár: 1982 sangskrivari: Michael Jackson

Um eitt lag var orsøkin til, at Thriller skuldi gerast heimsins mest selda pláta við 40 milliónum eintøkum, so var ongin ivi um, hvat tað var. Billie Jean herjaði alheims tónatindar í mánaðarvís og var eisini fyrsta lagið, har ein svartur sangari slapp gjøgnum hvítt-fikseraða nálareygað hjá MTV. Lagið broytti snøgt sagt poppheimin.

Sangurin um Billie Jean er sprottin úr eini nervandi røð av brøvum, sum Michael Jakson fekk frá eini sjúkligari kvinnu, ið vildi vera við, at Jakson var faðir at hennara barnið, og har hon loksins kravdi, at hann átti at gjørt enda á sær sjálvum ( sí tekstin: Billie Jean/ She's not my lover/ She's just a girl/Who thinks that I am the one/But the kid is not my son).

Legendariski Quince Jones, ið produseraði Thriller, hevur sagt um lagið: “Um so onkur rendi á teg við einum lastbili, so kundi tú kortini hoyra, at hasin sangurin var eitt hittlag.” Aftrat einfalda beatinum og runtgangandi bassinum, so er tað eisini framúr góða sang presentasjónin frá Michael Jackson, ið berur lagnum uppi.

### 6. I WANT TO HOLD YOUR HAND

Ár: 1964 sangskrivarar: John Lennon, Paul McCartney

Tað var við hesum lagnum, at Beatles fepurin rakti Amerika, sum fram til tá annars hevði verið púrasta óimponerað av enskum beat-tónleiki. Lagið er skrivað av Lennon og McCartney, sum báðir sótu við klaverið og royndu at skriva eitt hitt-lag, so The Beatles sum tann fyrsti

*Greinin endar á síðu 26*

## Topp 100 listin

1. Yesterday - The Beatles
2. (I Can't Get No) Satisfaction - The Rolling Stones
3. Smells Like Teen Spirit - Nirvana
4. Like A Virgin - Madonna
5. Billie Jean - Michael Jackson
6. I Want To Hold Your Hand - The Beatles
7. Respect - Aretha Franklin
8. With Or Without You - U2
9. I Want You Back - The Jackson 5
10. I Want It That Way - Backstreet Boys
11. Hotel California - The Eagles
12. Where Did Our Love Go - The Supremes
13. Sweet Child O' Mine - Guns N' Roses
14. Brown Sugar - The Rolling Stones
15. Imagine - John Lennon
16. Nothing Compares 2 U - Sinead O'Connor
17. Superstition - Steve Wonder
18. Losing My Religion - R.E.M
19. Vogue - Madonna
20. Like A Rolling Stone - Bob Dylan
21. Brown Eyed Girl - Van Morrison
22. Beat It - Michael Jackson
23. Oh, Pretty Woman - Roy Orbison
24. What's Going On - Marvin Gaye
25. Baby One More Time - Britney Spears
26. Go Your Own Way - Fleetwood Mac
27. When Doves Cry - Prince
28. MmmBob - Hanson
29. Bohemian Rhapsody - Queen
30. Your Song - Elton John
31. Smooth - Santana
32. (Sitting On) The Dock Of The Bay - Otis Redding
33. My Generation - The Who
34. Ironic - Alanis Morissette
35. Born To Run - Bruce Springsteen
36. Waterfalls - TLC
37. O.P.P - Naughty by Nature
38. Changes - David Bowie
39. Iris - Goo Goo Dolls
40. I Will Always Love You - Whitney Houston
41. Proud Mary - Creedence Clearwater Revival
42. Every Breath You Take - The Police
43. Miss You - The Rolling Stones
44. Dancing Queen - Abba
45. Tears In Heaven - Eric Clapton
46. The Tracks Of My Tears - Smokey Robinson
47. Jump - Van Halen
48. Jeremy - Pearl Jam
49. Tangled Up In Blue - Bob Dylan
50. Little Red Corvette - Prince
51. Just My Imagination - The Temptations
52. Maybe I'm Amazed - Paul McCartney
53. Faith - George Michael
54. Under The Brigde - Red Hot Chili Peppers
55. Bye Bye Bye - 'N Sync
56. I Will Survive - Gloria Gaynor
57. Our Lips Are Sealed - The Go-Go's
58. One Headlight - The Wallflowers
59. You Are The Sunshine Of My Life - Steve Wonder
60. Just The Way You Are - Billie Joel
61. The One I Love - R.E.M.
62. Papa Don't Preach - Madonna
63. In My Life - The Beatles
64. Bennie And The Jets - Elton John
65. Just What I Needed - The Cars
66. Time After Time - Cindy Lauper
67. My Name Is - Eminem
68. Only Happy When It Rains - Garbage
69. Just Can't Get Enough - Depeche Mode
70. Good Vibrations - Beach Boys
71. I Wanna Be Sedated - The Ramones
72. Free Fallin - Tom Petty
73. Do You Really Want To Hurt Me - Culture Club
74. Tiny Dancer - Elton John
75. Hot Fun In The Summertime - Sly and The Family Stone
76. Creep - Radiohead
77. Let's Stay Together - Al Green
78. Longview - Green Day
79. Nasty - Janet Jackson
80. I Need Love - LL Cool J
81. Don't Speak - No Doubt
82. Rock With You - Michael Jackson
83. I Want To Know What Love Is - Foreigner
84. Wonderwall - Oasis
85. Surrender - Cheap Trick
86. Don't You Want Me - The Human League
87. Brass In Pocket - The Pretenders
88. Gone Till November - Wyclef Jean
89. Careless Whisper - Wham!
90. The Boy Is Mine - Brandy and Monica
91. No Diggity - Blackstreet
92. You Shook Me All Night Long - AC/DC
93. Stayin Alive - The Bee Gees
94. All The Small Things - Blink-182
95. Good Times - Chic
96. PhotoGraph - Def Leppard
97. Love Shack - The B-52's
98. She Drives Me Crazy - Fine Young Cannibals
99. Just A Friend - Biz Markie
100. Tainted Love - Soft Cell

kelda: Rolling Stone - MTV America desember 2000